Bilar

Nr. 150 • hósdagur • 11. august 2005 • 79. árg.

Sp/f Bilrøkt:

# Jákup á Borg við bilrøkt og brúktbilasølu




*Sp/f Bilrøkt við Jákupi á Borg við Varðagøtu í Havn hevur spesialiserað seg í bilrøkt og at selja brúktar bilar*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Kendi fótbóltsleikarin Jákup á Borg er nú byrjaður sum sjálvstøðugt vinnurekandi við fyritøkuni Sp/f Bilrøkt á Varðagøtu í Havn. Fyritøkan hevur spesialiserað seg í at polera og reinsa bilar og at selja brúktar bilar**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Jákup á Borg er ikki bara fótbóltur. Nú hevur hann stovnað fyritøkuna Sp/f Bilrøkt, ið heldur til á Varðagøtu 75 í Havn, (har sum Suzuki hava verið seldir í mong ár), har hann slípar, polerar og klárger bilar bæði innan og uttan. Fyritøkan umboðar eisini ymiskar vørur til bilsøkt so sum 1Z poleringsevni og SUVO- rustvernd, sum eisini verða seld í heilsølu.

Jákup er 25 ára gamal og útbúgvin krambarkallur. Hann hevur nú í fleiri ár arbeitt sum sølumaður hjá ymiskum fyritøkum.

Hann hevur leingi havt ein dreym um at byrja fyri seg sjálvan. Spurdur um hví hann valdi bilbransjuna, sigur hann, at hann er uppvaksin í einum bilumhvørvi, og hann hevur altíð havt stóran áhuga fyri bilum.

Jákup hevur keypt sær alla neyðuga útgerð til at klárgera, lakkforsegla og polera bilar. Innan verða bilarnir reinsaðir og impregneraðir. Hendan mánaðin hevur Sp/f Bilrøkt tilboð upp á eina kompletta klárgering innan og uttan fyri 1.400,- krónur, og tá er bilurin sum spildurnýggjur, sigur Jákup.

Jákup sigur, at tað hevur stóran týdning at gera bilin kláran til føroyska veturin, sum fer illa við bilunum, og hann er altíð til reiðar við einum góðum tilboði upp á at gera bilin vetrarkláran.

Umframt at polera og reinsa bilar, selur Jákup eisini brúktar bilar fyri fólk. Hetta verður gjørt á tann hátt, at hann ger avtalu við kundum um prís, og bilurin verður settur til sølu og sýndur fram.

Tá heimasíðan: www.bilrokt.fo verður liðug í næstum, kunnu fólk síggja tey tilboð vit hava, sigur Jákup. Sp/f Bilrøkt hevur telefon 588880.

# Opel Vectra facelift

**Opel Vectra, sum hevur verið á marknaðinum í umleið trý ár, kemur í einari nakað broyttari útgávu í heyst. Talan verður um t.d. nýggjar lyktir, kúfangarar og smærri broytingar innan eins og tveir nýggir motorar vera á skránni**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Eftir umleið trimum árum á marknaðinum kemur Opel Vectra í eini nakað broyttari útgávu í heyst. Størstu broytingarnar eru framman við t.d. nýggjum størri lyktum, kølaragittari og kúfangarum. Bilurin minnir nakað um Opel Astra.

Innan eru onkrar smærri broytingar sum t.d. meira krom og nýtt ratt. Tveir nýggir motorar vera á skránni, ein 1,9 litur commonrail dieselmotorur við 100 hk, og ein 2.8 litur V6 við 230 hk. Hetta er sami motorur sum eisini verður í nýggja Saab 9-3 SportWagon. Allar útgávurnar hava ESP og aircondition sum standard.



*Opel Vectra kemur í heyst í eini nakað broyttari útgávu við t.d. nýggjum størri lyktum, kølaragittari og kúfangarum*